# Myndin vend á høvdið

**Seinasta veljarakanningin vísir, at Sambands- og Tjóðveldisflokkurin standa til at vinna teir báðar føroysku sessirnar á fólkatingi. Hinvegin vísir kanningin, at Javnaðarflokkurin verður størsti flokkurin við komandi. Samfelagsfrøðingur dugir ikki at meta um, hví so er**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*


*Sambært seinastu veljarakanningini, so skal Jóannes Eidesgaard av fólkatingi, men er væl á veg í løgmanssessin.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinasta veljarakanningin í røðini, sum Fregnir hevur staðið fyri, varð almannakunngjørd hósdagin. Kanningin hjá blaðnum vísti, eins og kanningin hjá Útvarpi Føroya, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fara at fáa umboðan á fólkatingi eftir valið 20. november.

-Kanningin skal metast sum ein støðumynd, og sjálvandi eiga eisini fyrivarni at verða tikin, sigur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur við Søgu- og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya.

Teir mest markantu spurningarnir í veljarakanningini, eru spurningarnir um, hvør verður valdur á danating og í løgtingið.

Kanningin gevur Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum sessirnar. Sambandsflokkurin fær 27,6%, og Tjóðveldisflokkurin fær heili 29,5 %. Harvið standa hesir báðir flokkar til at fáa umboðan á fólkatingi við stórum meiriluta, tá ið Javnaðarflokkurin einans savnaði 19,7 prosent saman, og Fólkaflokkurin, ið hevur átt umboðan á fólkatingi eitt mans minni, liggur heilt niðri á 17,5 prosentum í veljarakanningini. Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin fingu ávíkavíst 2,5 og 3,1 prosent, tá ið talt varð saman frá 882 spurdu fólkunum.

Er kanningin eftirfarandi, so er valstríðið so gott sum avgjørt, og teir báðir ytstu flokkarnir á loddrætta ásanum í føroyskum politikki kunnu finna sær hvør sín sess á danatingi.

Av royndum vita vit, at veljarakanningar kanska ikki altíð eru so eftirfarandi, og valluttøkan er vanliga rættiliga lítil til fólkatingsval í Føroyum.

Flestu eygleiðarar meta, ábendingarnar í veljarakanningini koma av tí, at ein polarisering er farin fram í føroyskum politikki. Tá ið Sambands- og Tjóðveldisflokkurin standa við hvør sín enda, so eru tað hesir, ið njóta gott av hesum.

## Samgonga?

Kanningin hjá Fregnum vísti eisini eina kanning av, hvussu hevði verið, um løgtingsval stóð á skránni. Henda støðumyndin gav ikki sama úrslit sum við kanningini um fólkatingsvalið.

Hevði løgtingsval verið, so metir kanningin, at Javnaðarflokkurin við 27,5% hevði verið størsti flokkur, og Tjóðveldisflokkurin, við 26,6%, eins og Javnaðarflokkurin hevði fingið 9 tingmenn. Fólkaflokkurin við 19,4% og Sambandsflokkurin við 20,4% høvdu fingið sjey tingmenn hvør.

Hetta vendir í veruleikanum myndina á høvdið, tá ið Javnaðarflokkurin gongur so mikið nógv fram. Vit spurdu Jógvan Mørkøre um orsøkina til hesa vend, og hann segði seg ikki kunna koma við nakrari fullgreiðari frágreiðin.

-Í fyrstu atløgu hugsi eg um, at tað var ein bólkur av veljarum, sum skifti frá Sambands- til Javnaðarflokkin, men vísti seg ikki at passa.

Jógvan sigur harafturat, at veljarakanningin vísir tað greiðu polariseringina, har javnaðarprofilurin ikki hevur verið eins klárur og teir hjá ávíkavíst Sambands- og Tjóðveldisflokkinum.

Um tað verður soleiðis, sum veljarakanningin sigur, so merkir hetta, at vit fáa bert fýra flokkar á ting, og teir báðir »veingirnir« fáa 16 tingmenn í part.

Um tað verður soleiðis, so hevði Jógvan Mørkøre gott kunna ímynda sær, at sitandi samgongu fór at halda fram, men kanska Tjóðveldisflokkurin fór at krevja meira.

Høgni Hoydal vil ikki gera viðmerkingar til hetta sum støðan er nú.

Jógvan Mørkøre undirstrikar, at tað er møguligt, at hetta fer at henda, men vit eiga at taka hetta við størsta fyrivarni.

## Sjónvarpið ger veljarakanning

Tað er nógv, sum røkist fyri, at ein triðja veljarakanning fer at síggja dagsins ljós. Í øllum førum arbeiðir Sjónvarp Føroya við einari veljarakanning, sum eftir ætlan skal gerast í vikuskiftinum og almannakunngerast mánakvøldið. Um veljarakanningin verður gjørd, so verður væntandi bert tann eini spurningurin um, hvønn flokk fólk fara at velja.

# Handilsskúlanæmingar velja Tjóðveldið og Samband

**Fríggjamorgunin var veljarafundur hildin á Handilsskúlanum í Havn. Umboð fyri politisku flokkarnar vóru við. Áðrenn fundin lógu Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin á odda. Eftir fundin gekk Tjóðveldið nógv fram, og Sambandið vardi sína støðu. Kanningin varð tó gjørd á einum eitt sindur skeivum grundarlag, sigur skúlastjórin**

VELJARAFUNDUR
*Heri á Rógvi*


*Næmingarnir á Handilsskúlanum í Havn fingu høvi til at hoyra sjónarmiðini hjá teimum ymsu flokkunum fríggjamorgunin.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eina løtu fríggjamorgunin sluppu næmingarnir á Handilsskúlanum í Havn undan at fara í tíma. Henda morgunin var nevniliga veljarafundur á skránni. Umboð fyri allir flokkarnar uttan Miðflokkin vóru møtt upp á fundinum. Fyri Fólkaflokkin Óli Breckman, fyri Sambandsflokkin Olav Enomoto, fyri Tjóðveldisflokkin Sjúrður Skaale, fyri Javnaðarflokkin Jóannes Eidesgaard og Eyðun Elttør var møttur fyri Sjálvstýrisflokkin.

Fundurin var skipaður soleiðis, at poltikikararnir fingu í tveimum rundum ávíst tal av minuttum til at koma við sínum hugsanum, og eftir hetta fingu næmingarnir eisini høvi at seta spurningar.

Veljarafundir eru ikki nakað, sum er vanligt nú, tá ið fjølmiðlarnir kanska meira enn nakrantíð ávirka valini. Fyrr var vanligt at halda veljarafundir alment, men hetta er vorðið meira ójavnt við árunum, men tað er framvegis ein áhuga fyri hesum. Næmingarnir á Handilsskúlanum í Havn tóktust áhugaðir í, hvat politikararnir høvdu at siga. Fundurin gjørdist til tíðir lívligur, og næmingarnir fingu eisini eitt sindur afturfyri stríðið at sita og lurta. Hvussu vanligir veljarafundir fara at vera í framtíðini er tó ilt at spáa um.

Á fundinum fríggjamorgunin nýtti politikararnir nógva tíð og orku at skjóta eftir hvørjum øðrum. Til tíðir gjørdist prátið eisini eitt sindur heitt.

## Kanning

Áðrenn fundurin byrjaði, so kunngjørdi skúlastjórin, Ragnar Magnussen, úrslitið av einari veljarakanning millum næmingarnar, sum varð gjørd áðrenn fundin. Henda kanning vísti, at Tjóðveldisflokkurin lá á odda við 28,5%, Sambandsflokkurin var nummar tvey við 25,5%.

Fólkaflokkurin hevði fingið 23,1%, og Javnaðarflokkurin kundi vísa á, at 14,6% prosent av veljarunum á Handilsskúlanum áðrenn fundir ætlaðu at seta sín kross við hann.

Sjálstýrisflokkurin átti áðrenn fundin 3,1%.

Eftir fundin var eisini ein kanning gjørd, og hon vísti, at Tjóðveldisflokkurin gekk rættiliga rættiliga nógv fram, og Sambandsflokkurin tepurt varðveitti sína støðu.

Ein sovorðin kanning eigur sjálvsagt at verða tikin við størsta fyrivarni, tá ið eitt nú næmingar undir valaldur kunnu luttaka. Eisini kann tað hugsast, at ikki somu fólk hava atkvøtt áðrenn fundin og eftir fundin.

## Eisini á Kambsdali

Á Kambsdali hevur eisini verið skipað fyri líknandi kanning. Á Kambsdali ganga fyri tað nógv eysturoyingar og næmingar úr Norðoyggjum, og hetta plagar at vera rættiliga blandað fólkaslag, verður sagt.

Á tí fundinum fingu Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hvør sítt umboð á fólkatingi. Tá er sagt, so skal tað eisini við, at Sambandsflokkurin áðrenn fundin átti yvir tríati prosent, men misti omanfyri seks prosent. Hinvegin gjørdi Javnaðarflokkurin og Jóannes Eidesgaard á tí fundinum eitt risa lop.

Einir tríhundrað næmingar tóku lut í kanningini á Kambsdali.


*Sjúrður Skaale legði í sínum framløgum mest eftir Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



Barsilsskipanin:

# Riggar bert í lívsvanda

**Barsilsskipanin, sum kom í gildi 12. juni í ár, tykist at vera heldur fýrakantað og stirvin fyri nógv. Eitt nú er orðing í barilslógini, sum krevur, at kvinna, ið er við barn, og verður óarbeiðsfør, skal hava eina læknaváttan, ið sigur, »... at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.« Um ikki júst henda orðingin verður nýtt, fær kvinnan onga barsilsløn og heldur ongan dagpening, av tí vit nú hava eina virkandi barsilsskipan**


*Eftir nýggju barsilsskipanini fáa kvinnur, sum eru við barn, eftir 23. viku, bert barsilsløn um tær eru í »heilsuvanda«*
*Savnsmynd*

BARSILSSKIPANIN
*Ingrid Bjarnastein*

Men nær er ein kvinna í heilsuvanda? Er hon í heilsuvanda tá hon fer yvirum vegin? Ella er fostrið ikki í heilsuvanda um mamman roykir eina sigarett? Í móðurmálsorðabókini stendur, at »heilsuvandi« er vandi fyri heilsuni. Tó er hendan orðingin ógvuliga bronglut, tí vit eru jú í heilsuvanda hvønn dag, fleiri ferðir um dagin.

– Hendan orðingin er ógvuliga óheppin, sigur Kári Rasmussen, formaður í Kommunulæknafelagnum.

– Hon setir bæði læknar og kvinnuna í eina óhepna støðu, tí kvinnan kann gerast óarbeiðsfør meðan hon er við barn, sjálvt um hon ella fostur ikki eru »beinleiðis« í heilsuvanda.

Sum nú er, verður kvinnan »flutt« frá dagpeningaskipanini til barsilsskipanina tá kvinnan, ið er við barn hevur minni enn 13 vikur eftir at ganga. Hetta vil tí siga, at um kvinnan ikki fær læknaváttan, ið sigur, at hon ella fostur eru í heilsuvanda, stendur hon eftir við ongum. Onki nyttar at venda sær til dagpeningaskipanina av tí, at dagpeningaskipanin vísir kvinnuni til barsilsskipanina.

## Upp til læknan

– Tað er upp til hvønn einstakan lækna at avgera, um kvinna ella fostur eru í heilsuvanda, sigur fulltrúin í Vinnumálastýrinum, Søren Pram Sørensen.

– Annars er tað ALS, sum umsitur barsilsskipanina, og eru tað tey, ið taka avgerðir um umsóknir til barsilsløn verða gingnar á møti ella ikki.

Tó verður arbeitt við eini vegleiðandi reglugerð til læknar, soleiðis, at læknarnir hava eitt hvørt at fyrihalda seg til. Sum er nú hava læknarnir onki at ganga eftir, og noyðast tí at meta eftir egnum førimuni um kvinnan ella fostur eru í heilsuvanda.

– Vegleiðandi reglugerðin til barsilslógina kemur at innihalda nakað av tí sama, sum vegleiðingin til donsku barsilslógina inniheldur.

Í donsku vegleiðingini standa dømir um støður ein kvinna, ið er við barn, kann koma í. Hetta fer at gera tað lættari fyri læknarnar, tí soleiðis hava teir nakað at fyrihalda seg til.

Sum dømi kann nevnast, at um donsk kvinna hevur kokuloysn, fosturvatnseitran, vaginalbløðing og annað, hevur hon eftir donsku reglugerðini rætt til barsilsløn. Í Føroyum eru fleiri dømir um, at kvinnur við kokuloysn ella fosturvatnseitran eru avvístar frá barsilsskipanini, tí orðingin um, at kvinna ella fostur eru í heilsuvanda ikki varð skrivað í læknaváttanina.

Føroyska reglugerðin kemur at líkjast donsku nakað nógv, men nær hon kemur er ilt at siga.

– Vit hava ikki gjørt nakað serligt við hetta enn, men ætlanin er tó at hon skal koma, sigur Søren Pram Sørensen.

## Danska lógin liðiligari

Á júst hesum økinum kann sigast, at danska lógin viðvíkjandi barsilspeningi, er liðiligari enn tann føroyska.

Viðvíkjandi sama evni sigur danska lógin, at »Kvinden er berettiget til dagpenge inden 4-ugers perioden før fødslen, hvis det efter en lægelig bedømmelse skønnes, at graviditeten har et sygeligt forløb, der ved fortsat beskæftigelse vil medføre risiko for kvindens helbred eller fosteret.«

Í Danmark verður ikki meira kravt enn, um kvinna við barn, hevur »et sygeligt forløb«. Her undir kemur síðani kokuloysn, fostur-vatnseitran, vaginalbløðing og annað.

At Føroyar ikki hava nakran skipaðan politikk viðvíkjandi »heilsuvanda fyri fostur og/ella hana sjálva« setir kvinnur og læknar í eina keðiliga støðu. Læknin skal bæði virka sum lækni og løgfrøðingur, tí metingin um kvinnan er í heilsuvanda ella ikki, má eisini síggjast út frá einum løgrføðisligum sjónarhorni.

Tað kann ganga rúm tíð innan vegleiðandi reglugerðin til barsilslógina kemur út, og til ta tíð noyðast føroyskar kvinnur, ið eru við barn, at vera frískar. Tí eftir 23. viku fáa tær hvørki barsilspening ella dagpening um tær ikki eru í »heilsuvanda«.

Hotel Hafnia 50 ár

Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum við alskyns heilsanum. Eisini til mongu, sum stukku inn á gólvið fáa stóra tøkk. Vit høvdu ongantíð droymt um, at so nógv komu at gleðast saman við okkum, og tað kendist hjartanemandi at hitta so nógvar vinir. Tit gjørdu okkum føðingardagin ógloymandi.

50 ár eru farin afturum, og vit standa á gáttini til eitt nýtt tíðarskeið. Mangan broytast ætlanir. Um tað verða vit báðir ella onnur, sum framyvir koma at mynda hotellið saman við góðu starvsfólkum okkara - veit ongin av okkum í dag. - Lívið so spyrst -

Enn einaferð takka vit viðskiftafólkum okkara fyri trúfesti og gott samstarv.
Ókendu framtíð leggja vit trygt í Harrans hond, at signing Hansara skal hvíla yvir gestum, starvsfólkum og virkinum hvønn komandi dag.

Takk øll somul.

P/f Hotel Hafnia
M.C. & Johan